## DAGSINS MEINING

# Vindorkan

Tað eru eftirhondini mong ár síðani, at vit í her Føroyum høvdu eitt lívligt og seriøst orðaskifti um orkuspurningin. Sum tey, ið eru tilkomin, ivaleyst minnast, vóru atfinningar setta fram móti SEV og móti orkupolitikkinum hjá hesum stovni. Mong funnust at teimum útbyggingarætlanum, sum snúu seg bara um vatnorkuna. Ikki soleiðis at skilja, at funnist varð at vatnorku í sjálvum sær, men heldur varð funnist at teimum ítøkiligu ætlanunum hjá SEV. Hildið var heilt einfalt, at hesar útbyggingar fóru alt ov illa við náttúruni og víst varð á, at aðrir vatnorkumøguleikar vóru, enn tær ætlanir, ið SEV vildi fremja. Eitt nú varð víst á, at farast kundi longur upp í hæddina eftir vatninum. Hetta var ein loysn, sum vildi havt gjørt tað møguligt at varðveita eitt nú áirnar í Eysturoynni, sum nú eru mestsum horvnar. Eisini varð víst á upplagda møguleikan í vindorkuni. Sum øllum kunnugt kveistraði SEV øll alternativ uppskot av borðinum og trumfaði sína ætlan ígjøgnum, og føroyska náttúran gjørdist munandi fátækari.

Ein av teimum, sum var mest virkin innan orðaskiftið um orkupolitikk, var verkfrøðingurin og hugsjónarmaðurin Tormóður Dahl, sáli. Við síni stóru vitan, sínum visiónum og sínum dirvi at ganga móti almenna streyminum stríddist Tormóður Dahl fyri skilagóðum loysnum og fyri einum skilagóðum og ábyrgdarfullum orkupolitikki. Hann vísti á møguleikar fyri vatnorku, ið ikki skemdu og týndu náttúruvøkur øki sum t.d. Eiðisvatn. Og hann vísti á vindorkuna. Sum so ofta í søguni fáa tey rætt, sum ganga ímóti tí viðtikna og tí frammanundan givna. Tormóður hevði rætt í øllum, sum hann bar fram um føroyskan orkupolitikk. Prógvini hava vit beint nú í hesum døgum við teimum vindmyllum, sum nú fara at framleiða streym til føroyska orkukervið.

Ein mylla stendur á Eystnesi. Hana hava vit ikki hoyrt nógv um, síðan hon varð sett upp. Tað tykist, sum hon ongan góðan hevur. Kortini hevur hendan mylla framleitt streym nátt og dag í fleiri ár. Og nú hava so vestmenningar við bóndanum og flogskiparanum Johan í Niðristovu á odda av álvara gjørt hol í sjógvin við eini verkætlan við vindmyllum Uppi á Mýrunum. Hetta er einn djørv og váðafull roynd, men alt bendir á, at royndin fer at eydnast. Tað er at vóna og ynskja. Tað er upp á tíðina, at vit av álvara fara at hugsa um aðrar varandi orkukeldur enn vatn. Vindorkan hevur alla tíðina verið eitt seriøst alternativ. Tøknin á hesum øki tykist nú so nógv ment, at eingin umbering er fyri ikki at troyta hesa keldu. Eisini eiga vit av álvara aftur at fara at umhugsa, hvussu vit best troyta vatnorkuna uttan at skaða náttúruna.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fingið Atlantsflog í rangastrupan!

**Jørmund Vágadal**



So var hann aftur, hevndareingilin úr Skálavík. Nú skal ikki minni enn alt føroya fólk hava eina frágreiðing um eina flúgving ein ávísan dag eitt ella annað stað vestanfyri Ísland.

Føroya fólk skal ikki hava nakra frágreiðing um nakað sum helst frá mær um flúgving, tað taka avvarðandi luftferðslumyndugleikar sær av. Skal ein frágreiðing gevast, so skal tað vera henda:

1. Fyri uml. 7 árum verða nakrir mekanikarar koyrdir hjá Atlantic Airways.
2. Ein av teimum koyrdu er svágur John Myllhamar.
3. Mekanikararnir eru fornermaðir og koma í bløðini við óvanliga grovum skuldsetingum um misrøkt av materiellinum hjá AA, sum teir sjálvir hava havt um hendi í fleiri ár
4. Undirritaði helt skrivingina vera so grova, at hann talaði at
5. Ikki vóru bløðini komin út fyrr enn John var komin til tað niðurstøðu, at svágurin skuldi hevnast. Hann sjoflaði bæði meg og familjuna út, sum um at vit vóru partur í trætuni.
6. Seinni filosoferar hann yvir ein túr við Maersk Air og hvussu deiligt tað var at flúgva við hesum flogfelagnum.
7. Seinni hendir so tað, at flogfarið hjá Maersk á veg til Føroya, er komið í somu hædd sum eitt norskt flogfar sunnanfyri Noreg. Og nakað seinni aftur roynir eitt annað flogfar hjá Maersk at lenda í ringum veðri. Ferðin var so ótespilig, at ferðafólk máttu hava professionella hjálp, tá tey komu aftur til Kastrup.
8. Undirritaði kundi ikki halda sær og helt at fólkini kundu fara niðan til missionerin at fáa sær hjálp.

Sjálvt um fleiri ár eru liðin og menn fyri langari tíð síðan hava funnið onnur størv og onkur enntá settur aftur í starv hjá AA, so tvassar missionerurin enn niðri í rununi og vendir hvørjum steini um ikki okkurt er at kasta eftir føroyska flogfelagnum.

Eg havi ongan trupulleika við flogfeløgum og havi tað fatan, at føroya fólk heldur ikki hevur nakran trupulleika við flogfeløgum generelt. Eg seti meg inn í eitt flogfar við somu kenslu uttan mun til, hvat felagið eitur. Eg siti líka gott í føroyska flogfarinum, sum eg siti í flogførunum hjá Maersk, Iberia, Lufthansa, Canada Air, British Airways og nógv nógv onnur flogfør, sum eg havi ferðast í runt alla jørðina. Havi eg verið skeptiskur, so man tað hava verið tann dagin, vit við eini russiskari Turbulev transportmaskinu skuldu flytast frá Georgia til Russlands, men eisini hetta komu vit livandi frá.

Hevndarhugurin, sum sær út til at hava útviklað seg til eina reina krossferð móti Atlantsflog gevur tær tað óhugnaligu kensluna av, at um tað syndarliga óhapp skuldi hent, at Atlantsflog misti eitt av sínum flogførum, so bleiv dansur og gleðisrómur uppi hjá missionerinum.

Míni ráð, Dear John, steðga áganginum áðrenn tú tekur so stóran skaða, at professionell hjálp verður neyðug. Tað er bert í tínum tvistaða heilaspuna, at ótti fyri at flúgva við Atlantsflog finst. Vit onnur hava ongan trupulleika í so máta, ikki annað enn vanliga spenningin, sum tað nú einaferð er at flúgva. Og trúgv mær, flogfarið hjá Atlantic Airways kemur neyvan nakrantíð at flúgva so høgt, at missionerar skulu føla seg hóttar. Vónandi koma tey heldur ikki at flúgva so nær runudýkinum, at tey renna seg í mylhamska afturendan.

Havandi í huga avmarkaða kunnleikan um flúgving verður frá mínari síðu ikki skrivað meira um hetta mál.

# Dupultmoralur og hýklarí føroyinga

**Hans Birgir Hansen**

Dupultmoralur og hýklarí føroyinga er ikki bert galdandi politikarar, men føroyingar í síni heild, ið ikki liva og virka í náttúligum, menniskjaligum, moralskum, etiskum nærumhvørvi. Tað, at føroyingar eru komnir ov langt avsíðis frá áðurnevndu fyribrigdum, kemst av fremmandari heilavaskan og indoktrineran av sinnalagnum hjá øllum, heilt frá børnum til fólkapensjónistar.

Tað hevði sømt seg øllum føroyingum at slept øllum dupultmorali og hýklaríið, ið ikki er nøkrum til sóma – eg hugsið um ta dupultu tilveruna við hjámaka við síðuna av tí maka, ein hevur í dag.

Tað hevði verið frægari at hava ein hugburð! Hvar er ein fyri og ímóti? Og hvønn politik vil ein reka og byggja sína støðutakan á? Fyri mítt viðkomandi, byggir ein á áðurnevndu fyribrigdir. Øll eiga eisini at gevast við allari hýklan og sleikjan fyri teimum ráðandi, ið skulu læra at standa á egnum beinum eins og føroyingar í síni heild. Duga øll, ið lesa føroysku bløðini, at skilja tað?

Tað eru somuleiðis føroyingar, ið bedraga og snýta onnur við at vera óheiðurlig og óreiðilig við atliti til peningaviðurskifti, og at vera óseriøs og ómotiverað við at lata sum einki.

Nógvir føroyingar eru, ikki tað konufólk ella mannfólk, sum tey geva seg út fyri at vera í gerandislívinum. Ein kennir muruna í øllum tí, ið ein dagliga stríðist við í Havnini í dag. Hesi seinastu árini, havi eg fingið at sæð hvat ring samvitska førir við sær. Eisini havi eg sæð, at alt ikki spælir so væl av hjá øllum, ið bukka undir ov stórum trýsti. Hetta hevur fingið fleiri at beina fyri sær í Havn. Eg havi »inside« vitan, forstáilsi, tilvitan um mannakroppin og dagliga mannalívið. Hetta greiðir ein frá í túsundtals lesarabrøvum, aftaná dagligan lesna, granskin og av royndum, ið ein hevur upplivað.

Eg havi áður, í túsundtals lesarabrøvum, gjørt øll daglig fyribrigdi, ið eyðkenna øll ættarlið av føroyingum, ið genera og provokera hvønn dag og hvørt kvøld í Havnini.

Eg havi fingið avbygdar og býarfólki at avdúka seg persónliga í tí dagliga gerandislívinum og sýna mær teirra býttleika og svagligheit. Eg skal framhaldandi klæða øll úr inn á kropp og sál, ið ikki eru á røttu síðuni viðvíkjandi lóg, landaskili, politikviðtøku, ferðslu- og rúsdrekkalóg.

Óheft/heft at øllum felagsskapum, klubbu og trúarsamkomum finna vit ættarlið, við eyðkendum dupultmorali og hýklaríið føroyinga. Innan fyri øll tey væl etableraðu harkaliðini í Føroyum sæst tað.

Tað vil siga, at øll, ið fáa av grovfílini frá mær í øllum tí dagliga kjaki og í lesarabrøvum í føroyskum bløðum, mugu vakna úr sínum søta »Tornurósudreymi« kring landi og í Havnini dagliga.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14⁰⁰

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Skipaðan arbeiðsmarknað?

**Heini Joensen**
*Næstformaður í Starvsmannafelagnum*

Seinasta hálva árið hava vit verið vitni til ætlaðan leik, við Føroya Arbeiðsgevarafelag sum leikstjóra, og Bjarna Djuurholm sum íspegil.

Byrjað verður við, at Vinnuhúsið nýtir alla orku, at geva arbeiðarafeløgunum fulla ábyrgd av verkfallinum. Síðani verður trúttað niður í fólk, at Føroyar hava heimsmet í verkføllum. Um somu tíð verður Gallup biðið um at gera eina onkisigandi og villleiðandi kanning.

Meðan hettar gongur fyri seg, verður fulltrúði hjá Bjarna settur at grava gomlu umsettu donsku lógina um arbeiðsmarknaðin fram aftur. Síðan trýnur Bjarni fram á pallin. Í bestu summarferiutíð verða brøv send út, tí nú skal skil koma á arbeiðsmarknaðin. Og tá samfelagið er við at vakna úr summardvalanum, er klárt hjá Bjarna at fara í hernað.

Bjarni! Ikki sørt, at sáttmálapartarnir smírdust, tá vit í einum steðgi í samráðingunum, hoyrdu teg í loftmiðlunum skíra skipanina á danska arbeiðsmarknaðinum verandi av heimsins bestu. Ikki minni, tá tú alfaðirliga greiddi okkum frá, at sjálvt Starvsmannafelagið at enda fer at ynskja hesa donsku lóg vælkomna.

Ringt var tó, at halda látrinum aftur, tá eg seinni las samrøðu tína vid Dimmalætting fríggjadagin. Har tú greiður frá, at sjálvandi varð tað tú í legði uppskotið um fastan gerðarætt og semingslóg fram, tí tú hevði so sera gott innlit í júst hesum málinum.

Seinni tagnaði láturin tó. Í gjøgnumgongdini av tínum arbeiði at gera skipanir á arbeiðsmarknaðinum, sigur tú:

»Ein nevnd var longu sett í 1998 at arbeiða vid hesum máli, men har spurdist einki burturúr, tí kjakið bleiv, um málið um ein gerðarætt skuldi snúgva seg um lóggeving ella um avtalur. Og so var tað spurningurin um fundarsamsýning. Aftur í 2000 var ein nevnd sett um at gera eina nevndarsamtykt. Men heldur ikki tá bar til, og Starvsmannafelagið møtti illa upp til fundirnar, sigur Bjarni Djurholm. Og sum ikki einaferð, tók ósemja seg upp um arbeiðið umframt afturvendandi kjakið um fundarsamsýning«.

Her fert tú ikki bara lætt um sannleikan, hettar er ein stór, loddrøtt lygn úr enda í annan.

Tann fyrra nevndin fra 1998 skal eg ikki svara fyri, Starvsmannafelagið átti ikki umboðið í arbeiðsbólkinum. Men í seinnu nevndini umboðaði eg almenna arbeidsmarknaðin. Hildin var 1 fundur, Bjarni Djurholm, ein. Fundurin varð hildin á tínum kontóri í Tinganesi. Møtt vóru Vígdis Johannesen, umboðandi privata arbeiðsmarknaðin, eg sjálvur og fulltrúðin, tú hevdi sett. Hvørki almennu ella privatu arbeiðsgevaraumboðini møttu. Fundurin var tí óformligur og tú var eisini við í kjakinum. Hettar, hóast ætlanin ikki var, at tú skuldi vera á fundi.

Síðani hava vit hvørki hoyrt orð ella eið. Burtursæð frá, at fulltrúðin, onkuntíð eg havi hitt hann, hevur havt á munni, at vit áttu at savna nevndina aftur.

Á fundinum greiddi eg tær frá um danska arbeiðsmarknaðin:

At danska arbeiðsmarknaðarskipanin vard grunnløgd við høvuðsavtaluni í 1899, og at allar lógir um gerðarætt, arbeiðsrætt og seming aftaná tað eru gjørdar eftir semju millum partarnar. Tað er tað serstaka við donsku skipanini, harra Bjarni Djurholm, ið tú sigur vera heimsins bestu. At partarnir sjálvir avgerða spælireglur, sum teir tískil kenna sum sínar egnu.

Tí greiddi eg tær eisini frá, at Starvsmannafelagið onki hevði ímóti nýhugsan á arbeidsmarknaðinum, men skuldu samráðingar um tað takast upp, mátti okkara sáttmálapartur, ið landstýrið hevur valt at vera Fíggjarmálastýrið, taka spurningin upp við okkum.

Tað eru ikki bara vit, ið hava greitt tær frá hesum. Eisini umboð fyri Dansk Industri greiddi tær frá, á fundi í Vinnuhúsið, minnist meg rætt, stóð fyri á Hotel Føroyum, at »Den danske model kan ikke kopieres«, nevniliga tí hon er grundað á avtalu millum partarnar. Sama hevur umboð fyri LO sagt frá í samrøðu við eitt av bløðunum í summar. Hví trongir tad ikki inn? Tá partarnir eru samdir um spælireglur, skulu vit boða tær frá, og sídan skalt tú sleppa at smíða lógir.

Markháttligt allíkavæl, at sitandi samgonga í hesum Ulla Bøje´tíðum, og tosi um samráðingar millum javnbjóðis partar aftur eru frammi, ikki skal fata hettar. Hví skal Bjarni Djurholm og hansara umsiting kroysta lógir í høvdi á okkum? Hevur nakar av teimun roynt arbeiðsmarknaðarsamráðingar áður? Og hvar skal følingin av, hvørjar loysnirnar eru, koma frá?

Øll vit, ið hava roynt samráðingar við Føroya Arbeiðsgevarafelag, vita, at talan ikki er um veru-ligar samráðingar. Allar reguleringar í sáttmálanum skullu takast burtur, tí arbeiðsgevarin sjálvur er bestur at stýra tí, og lønin skal vera so lág sum møguligt, tí tey flestu fáa meiri allíkavæl. Restin verður litið upp í hendurnar á semingsstovnin.

Sjálvt undir verkfallinum í vár nýtti Vinnuhúsið hettar. Um tad er so, at tey flestu fáa meiri enn minstuløn, hví í Harrans navn skal samfelagið trælabindast í einum verkfalli í fleiri vikur? Kundi semja ikki funnist, áðrenn komið var so langt?

Og hví varð verkfallið longt við heilum síðum í bløðunum við manipulerandi útspillingunum, bert fyri at trýsta politiska myndugleikan upp í spæli.

Svarið liggur helst í siðvenjuni hjá arbeiðsgevarunum. Teir eru ikki vanir at klára seg sjálvar. Hóast bæði teir og politikkarnir reypa av, at stuðulin til vinnuna endaliga er avtikin, so er einasta vend, at har vit fyrr stuðlaðu yvir skattin, skal lønarafturhald nú verða okkara stuðul. Til tað skulu teir eisini stuðlast til samráðingarnar.

Skal skipanin á arbeiðsmarknaðinum nútíðargerast, er neyðugt, at Vinnuhúsið kemur til samráðingarborið. Men treytin er eyðsýnd. Politiski mynduleikin noyðist eina ferð med alla at gera teimun greitt, at samráðingarnar á arbeiðsmarknaðinum noyðast teir at klára sjálvir. Ikki fyrr enn teir hava fingið fatan av tí, kunnu partarnir fara í gongd við veruliga at skipa arbeiðsmarknaðin av nýggjum. Tí í seinasta enda ynskir ongin hvørki verkbann ella verkfall. Men tað krevur, at tveir javnbjóðis partar setast yvirav hvørjum øðrum.

Umframt hetta krevst, at partarnir hava álit á hvørjum øðrum og ikki minst at trúvirði er til staðar.

At framleida villeidandi statistik fremur ikki trúvirði. At Vinnuhúsið nýtir stóra orku, at umseta meiningina hjá Dansk Arbejdsgiverforening, er teirra borð. Men harfrá, at endurgeva villeiðandi hagtøl og gera skeivar útrokningar fyri at føroyska tilfarið, fremur ikki trúvirði. At DA heldur tað vera ein funnan fress, at hagtøl fyri verkføll skullu leggjast fyri 4 ár, har størsta verkfallið í ártíggjur í Danmark av »tilvild« liggur innanfyri mugu danir strýðast um. Men at Vinnuhúsið atfinningarleyst umsetur hettar til føroysk viðurskifti beinleiðis eitrar orðaskifti.

Tað hevur lukkast væl, at geva føroyingum tað fatan, at hvørja fer samráðingar eru, endar tað í verkfallið. Men hví hava hesi verkføllini verið. Fyrst og fremst er tað grundað á manglandi álitið og trúvirði millum partarnar. Tað byrjaði við eini greiðari avtalu millum partarnar, at løntakarin á almenna arbeiðsmarknaðinum skuldi fara 10% niður í løn í eitt 10 mánaðar skeið, til at hjálpa uppá tað vanlukku støðu vinnulívið hevði ført okkum í. Henda semja varð greitt brotin, og avleiðingarnar sóðu vit fram til verkfallið í 1999. Privati arbeiðarafeløgini høvdu somu positivu medferð. Hóast ongin ábyrgd kundi leggjast á teirra herðar, nýtti Vinnuhúsið teirra vælvild til at fanga tey við buksunum niðri. Ongantíð hevur Vinnuhúsið almannakunngjørt, at lønargongdin øll hesi árini hevur ligið um 4% í grannalondunum hvørt einasta ár. Skulu vit hava nakað statistiskt tilfar, so skulu vit hyggja 30 ár aftur í tíðina, og hetta hevði víst, at føroyski arbeiðsmarknaðurin er serstakliga friðarligur. Tað, Bjarni Djurholm er í holt við, fremur misálit og harvið stríð, trýst elvir til móttrýst. Er tað veruliga tað tit ynskja.

At enda Bjarni, eini vinarráð. At tú hevur politiskar ambitiónir, lýsur av tær, serstakliga við tíni markleysu markeringstrongd. Vandin liggur tó í, at mussaskøði tekur yvirhond, har høvdið og heimaarbeiði sjáldan fylgja við. Sovorðnir politikkarar verða ofta døgnflugur. Teir, ið standa eftir, tosa lítið, gera sítt heimaarbeiði, og lata eftirtíðina døma um, nakað kom burturúr.

Og sum seinasta viðmerking í hesi umbering, so kemur onki svar frá okkum, áðrenn hoyringsfreistin er runnin. Orsøkin er einføld. Títt trúvirði er farið. Sum tú veist, er hettar eisini orsøkin til, at ministarar í øðrum londum noyðast frá, tá teir tríva til lygnina í almenna orðaskiftinum. Ein landstýrismaður uttan trúvirði eigur ikki at vera nakar savnaðargripur.

# Unødig bukken og skraben

**Eg las vid undran eina grein í »Politiken«, skrivað av bladmanninum Morten Rubin, um frumframførsluna av filminum um loysingarsamráðingarnar, sum endaðu í einum runudíki. Politiken hevði ikki pláss, men innihaldið roynir at rætta nakrar misskiljingar og taka luftina úr nøkrum mytum. Tí biði eg innivist fyri hesum orðum í Sosialinum.**

**Rolf Guttesen**



Under overskriften »Kongen af Færøerne« serverede Politiken mandag 18. august en artikel af Morten Rubin. Det drejer sig om Ulla Boje Rasmussens film »Færøerne.dk«, der handler om Landsstyrets forhandlinger med Regeringen om løsrivelse. Men artiklen fokuserer alligevel mest på Vicelagmand Hoydals gøren og laden denne aften.

Det er ikke småting af superlativer og svulstige sammenligninger Rubin kommer med, når denne nationalistiske vicelagmand skal beskrives. »Selvstændighedsdrømmen lyser i hans øjne«, »Færøernes Tony Blair«, »urystelig, nærmest religiøs tro på egne evner«. Vicelagmand Hoydal er en velbegavet, arbejdsom ung politiker, som især har udmærket sig ved altid at finde et eller andet positivt, reelt eller ej, i de mange tilbageslag, han har været ude for. Måske har netop hans arbejdsomhed og iver taget pusten fra mange »gamle« politikere.

Man skal huske, at Løsrivelsespartiet kun har opbakning af 20-25% af vælgerne. Af Rubins artikel kunne man få det indtryk, at færinger er enige om en fælles kurs mod løsrivelse. Det er slet ikke tilfældet.

»Selvstændighed er et emne, færinger har talt om i et århundrede«. Hvis der havde stået »selvstyre« havde det været delvis rigtigt. Der gives ingen antydning af at ca. halvdelen af befolkningen ikke har ønsket selvstændighed eller løsrivelse. Men alle ønsker i dag mere selvstyre. Kan økonomien klare det, er man rede til at overtage flere ansvarsområder. Men det er ikke lig med støtte til Hoydals løsrivelsesiver.

Rasmussens film siges at »understrege Danmarks rolle som ufølsom kolonimagt«. Men Færøerne har aldrig været en koloni, hverken formelt eller reelt. Da grundloven skulle skrives i 1849, betragtedes Island og Færøerne som nordiske broderfolk, medens Grønland og de Vestindiske Øer var kolonier. Færøerne er i det store og hele blevet behandlet mildt og nænsomt. Der har i høj grad været taget hensyn til færøske ønsker, hvis færingerne ellers kunne blive enige.

Danmark har jo været en mærkelig »kolonimagt«, som har støttet udviklingen af øerne frem til et velfungerende samfund. Alligevel er det blevet en myte, at bloktilskuddet ødelæggert den færøske økonomi. Hvis den færøske økonomi i 80-erne udviklede sig uheldigt, var ikke bloktilskuddets skyld, men kortsynede, konfliktsky færøske politikere, der forvaltede de mange penge på en horribel måde. En ordentlig forvaltning af bloktilskuddet vil selvfølgelig kunne skabe større samfundsmæssig rigdom.

Men jeg glæder mig til filmen.